# Er nøkur grund til euforiskt OBAMILSI?

VIRGAR T. DALSGAARD



Føroyingar hava í eina tíð samlað uppá avdankaðar amerikanskar presidentar, sum eru fráfarnir, og fyri rævandi stórar upphæddir hava føroyskir ríkmenn boðið teimum til Havnar at halda fyrilestur. Hesar *anti-hendingar* fingu føroyskar fjølmiðladreingir heilt upp í loft og summar av teimum næstan í ekstasu!

Nú hava fráfarnir presidentar ofta risastóra skuld og fyri at finansiera sítt otium plaga teir at ferðast um verðina við banalum sjálvfylgiligheitum. Tað, teir siga, er púra ófarligt, og tað er avgjørt einki *informatiónsvirði* at heimta í teirra oratoriska møsni. Men, gaman í, tað er allarhelst størri *undirhaldsvirði* í tí at hoyra ein verðinskendan møsnara enn eitt av okkara lokalu høsnarhøvdum.

Í morgin leggur "Buskurin" frá sær í *Tí hvíta Húsinum*, og so kunnu føroyingar jú fara at dyrgja eftir honum. Men "Buskurin" er so mikið múgvandi, at tað er óvist, um hann skoytir um at koma til Havnar.

**Obama er eingin gandakallur**

Men, ið hvussu so er og ikki, beint nú eru fyribils meginparturin av teimum occidentalu tíðindadreingjunum farnir at elta og elska Obama, og tað er lítið mark fyri, hvat nógvir halda, at hann skal kunna útrætta av undurverkum.

Men hvat fer Obama at kunna avrika? Ja, vit vita lítið um, hvat hann ætlar ella torir at gera, nú tann amerikanska kapitalisman liggur fyri deyðanum. Sjáldan, um nakrantíð hevur so lítið av konkretum innihaldi verið í viðførinum hjá einum komandi presidenti. Og tað er *ikki* nógv, sum týðir uppá, at hann fer at hætta sær at røra við tey *fundamentalu* problemini í tí amerikanska samfelagnum.

Aðalinnihaldið í røðum hansara hevur verið rakstrarróp, sum "**We want change**", "**We´ll get there**" ella "**Yes,we can**". Við so innantómum gorri hevði eingin europeiskur politikari verið valdur. Ja, tað skuldi kanska líka verið ein føroyskur fullveldismaður av "*vit vilja og kunna sjálvi"-typuni*. Men hevur Obama ikki meira enn geldan retorikk í skjáttuni, so kunnu tey higartil framdu bankatiltøkini ikki fora fyri, at vit aftur fáa eina nýggju krisu um ein góðan mansaldur. Obama tykist púra ráðaleysur longu, áðrenn hann er komin í sessin! Men livst, so spyrst!

Obama varð bara valdur, tí amerikanski veljarin ikki visti sær nakað alternativ. Men í løtuni ganga ca. 50000 arbeiðsleysir finansdreingir og klynka. Aftan fyri teir hava staðið veldigar lobbyfyritøkur, sum hava verið stórviðurin í tí amerikonsku kapitalismuni. Tær verða ikki lættir at leypa um. Skal Obama stýra heilt uttan um ta lobbyina, má hann vera óvanliga sterkur og hartil djarvur.

Men fryktandi er fyri, at sjálvt fundamentið í tí amerikonsku kapitalismuni er so rotið, at Obama skal duga gand, um hann skal venda fíggjarliga rákinum eftir bara fýra árum, og kann hann ikki tað, so missir hann fólkaeydnuna, og verður allarhelst fyrrverandi presidentur í 2012. So tað er valla nøkur grund til hvørki obamilsi ella dánilsi.

Noyðist Obama at lúta longu um fýra ár, so kunnu føroyingar jú altíð senda boð eftir honum og bjóða honum til fyrilestrar. - Tá fáa teir hann ógvuliga bíliga!

# Visjónsleysar raðfestingar

HERGEIR NIELSEN



Vakstraravtalan fyri Suðuroynna er í fleiri umførum viðgjørd á tingi, og hon liggur nú í vinnunevndini.

Annar faðirin at hesum uppskoti sigur nú, at politiski myndugleikin skyldar suðuroyingum eina greiða fráboðan, um hann vil vera við til at fremja málið ella ikki.

Hetta er greið og virðilig tala frá einum, ið ikki enn hevur mist allar vónir um at røkka einum máli, sum allir flokkar hava lovað at fremja.

Undir viðgerðini av uppskotinum hesuferð fekk málið annars sera góða undirtøku frá flest øllum tingmonnum.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum kendi seg kortini kallaða til at boða frá, at hetta var ikki rætta løtan at koma við hesum máli, og nú sæst so sjálvur løgmaður tíverri verja hesa andstøðu móti Suðuroynni.

Undarligt kortini, sum alt broytist.

Fyri árí síðan, tá ið CHE-samgongan var farin undir virkið sítt, avtalaði hon í samgonguskjalinum, at vakstraravtalan fyri Suðuroynna skuldi fremjast.

Tveir andstøðutingmenn, sum báðir nú sita í landsins ABC-stýri, vóru tá so forliptir í hesi avtalu, at teir løgdu uppskot fram um at fara undir hana beinanvegin, og langt áðrenn landsstýrismaðurin á økinum hevði fingið stundir at fóta sær.

Hetta var júst tann rætta, og enntá tann lagaligasta løtan, søgdu hesir báðir fyri einum ári síðan.

Nú Suðuroyarblóðið fossar í hvørji æðr í Tinganesi, nú tykist einki bera til kortini, og eingin áhugi var fyri at flyta Suðuroyarmálið úr CHE – og yvir í ABC-skjalið yvirhøvur.

Víðari menning av serføroyskum hugskotum, sum spretta júst í Suðuroynni, so sum trollemmur, skipsskrúva, oljureinsingarskipan, serføroysk toskaaling, fyri bara at nevna nøkur teirra, høvdu ivaleyst verið upplagdir partar í eini vakstraravtalu, men nei.

Nú tykist politiski myndugleikin ræðast víðari menning av tøkniligum frambrotum, sum enntá eru komin í eygað.

Eitt tað størsta vakstrarpotentialið í føroyskum vinnulívið finna vit í Hvalba, har heldur eingin vilji sæst vera til at taka tøk til samfelagsins besta.

Flokspolitisk seráhugamál viga nú munandi tyngri á íløgusíðuni enn vinnulig framtøk, sum samfelagnum tørvar í stóran mun á inntøkusíðuni.

Vakstraravtalan er ov lítið ítøkilig, og Hvalbiarbergholið er ov ítøkiligt, sigur sami politiski myndugleiki, sum ikki orkar so mikið sum at fáa tummilin uppeftir.

Sjálvt javnbjóðis og rættvís viðger á fíggjarlógini til grótkastið á Hamranesi varð noktað hvalbingum.

Almenna skyldan og kolossala samfelagsliga gagni í at fáa útflutningin av landinum verður tíverri ikki raðfest syndarliga høgt í syðra partinum av landinum, og tíverri satsar politiski myndugleikin allar aðrar vegir enn á inntøkusíðuni, nú samgongan tíverri slepti Hvalbiarbergholinum komandi 10-15 árini.

Harmiligt er, at hóast blóðið rennur suðureftir, so renna krónurnar norðureftir.

Um vakstraravtalan fær somu lagnu sum Hvalbiarbergholið, vita vit ikki í løtuni, men tað fáa vit so upp á skrift fyrsta dagin, tá ið álitið kemur aftur úr vinnunevndini.

# Jenis, Húgni og Høgni

ÍVAR IVERSEN



Tá tíðindi um ísraelar og palestinar ræður, tykist mangur at fáa ilt í búkin ella kanska uppaftur verri - ilt fyri hjartað. At bera tíðindi til lurtarar bæði um líkt og ólíkt, er álagt einum og hvørjum tíðindamanni/kvinnu, ið eru útbúgvin til tað. Heimurin er vorðin lítil sammett við tað, vit fyri 50/60 árum síðan kundu ímynda okkum hvat fyrifarast kundi úti í tí stóru verð.

Illimaður liggur altíð framvið til tess at stimbra tað ónda, ið av Skaparans hond upprunaliga var ætlað okkum til gleði og frama. Nú kemur Jenis av Rana - sum ikki einaferð - við niðurgerðina av tíðindafólkum, ið royna at lýsa ta aktuellu støðuna, tí tey - tíðindafólkini - eru ikki 100% hansaramegin andsýnis ísraelum contra palestinum. Hann roynir av øllum alvi at niðurgera tíðindi teirra, tí tey eru, eftir hansara hugsan, vinstrahall, og tað er av tí ónda fyri hann.

Hendan nógv umrødda norðmannin, læknan Gilbert, sum var at síggja í sjónvarpinum, ið rynir at hjálpa teimum illa særdu og deyðkomnu í Gaza við at seta sítt egna lív í váða, niðurgerð hann sum fyrrverandi og kanska verandi terrorist, tí hann elskar ikki Ísrael, George W. Bush og jødar og annars alt tað, ið Jenis av Rana stendur fyri. - Eru gomul, kvinnur, børn og onnur óhjálpin palestinskumegin ið liggja í millum, er tað bara harmiligt; men harðskapur ísraela andsýnis hesum hjálparleysu tykist hjá honum - Jenisi - at vera ein sjálvsagdur rættur teirra. Har tykist eingin samkensla at vera. - Eg havi als ongan samhug við Hamas, ið, eins og Jenis av Rana og aðrir Ísraelfanatikarar her heima, ikki hava áhuga fyri eini neyðsemju. Hamas eins og hesir trábeitnu krevja rættvísi fyri síni sjónarmið. Hjá hesum fanatikarum eksisterar eingin neyðsemja. Nei! - annaðhvørt ella. Stór synd bæði í ósekum palestinum og ósekum ísraelum.

Sum tíðindamaður í útvarpi Føroya í 40 ár havi eg upplivað mangar kollveltingar og rembingar frá 1960 til ár 2000, har »geografiin« broytti Europakortið burturav í 1990-árunum. Hesin Jenis av Rana hevur helst tá hingið og reiggjað inni í Trongisvági, sum suðuroyingar so væl duga at taka til, uttan at vit her norðanfjørðs altíð dugdu at skilja tað, ið sipað var til. Tit! Tíðindafólk í kringvarpinum: Latið tykkum ikki verða tikin av fótum, bara tí at ein fanatikari heldur tykkum halla í so nógv til vinstru.

Hvussu tað annars fer at hepnast Jenisi, George W. Bush, ið hvarv úr forsetasessinum týsdagin tann 20. í hesum, og jøðum yvirhøvur at sannføra okkum vanligu menniskju um serrættindi ísraela til at gera tað, teimum lystir, fer tíðin at vísa. Vit vanligu menniskju styðja og stuðla Ísrael, kortiliga ikki eftir somu præmissum sum fanatikararnir.

# Hvør kann hjálpa mær?

DIA ELLINDSSON



**Til allar suðuroyingar og onnur.**

Hvør kennist við hesa konuna?

Elisabeth Kathrina Muller, fødd 14. februar í 1876, fyrsta barn hjá Lars Muller, Porkeri og Mariu Soffie Kvalvig, Víkarbyrgi.

Fólk, sum vita okkurt at siga um Elisabeth Kathrine, eru vælkomin at ringja á tlf. 448204 ella á 268296.

Lesið Sosialin